Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Heygum & Petersen Advokatskrivstova
POSTBOKS 164
110 Tróshavn

**Att.: Bjørn á Heygum, adv.** **Tórshavn 22. mars 2011**

Journal nr.: 10/00312-4
Viðgjørt: S.R.

# Avgerð viðv. yvirtøkuni hjá P/f Faroe Link Maritime av ávísum ognum hjá P/f Faroe Seafood í konkurs

## 1. Samandráttur

Kappingareftirlitið hevur móttikið fráboðan um, at P/f Varðin, Sp/f Framherji, Samherji hf. og P/f Bacalao hava stovna felagið, P/F Faroe Link Maritime, sum hevur keypt ávísar ognir frá P/f Faroe Seafood í konkurs. Ognirnar, sum talan er um, eru trý pør av partrolarum og fýra flakavirkir.

Ognarviðurskiftini í P/F Faroe Link Maritime eru soleiðis, at P/f Varðin eigur 45% av partabrøvunum, P/f Bacalao eigur 5%, meðan Sp/f Framherji og Samherji hf. eiga hvør síni 25%.

P/f Bacalao hevur vinnulig áhugamál innan fyri sama skipabólk, partrolarar, sum P/F Faroe Link Maritime. Kappingareftirlitið metir ikki, at hetta í sær sjálvum skapar kappingarlig ivamál, tí P/f Bacalao er minniluta partaeigari í bæði P/f Nofa og P/F Faroe Link Maritime.

Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan av ognunum hjá Faroe Seafood førir við sær, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist. Lóggávan á økinum avmarkar, hvussu nógv veiðuloyvi kunnu ognast – mest loyvdi ognarpartur liggur niðanfyri tað, sum í kappingarligum høpi vanliga verður mett at geva høvi til at halda, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Um veiðan hjá teimum trimum keyptu partrolarunum burturav fer til tey keyptu flakavirkini, er óneyðugt at meta um kappingarligu ávirkanina, tí tá er talan um innanhýsis sølu. Tá er tað sølan av teimum fiskavørum, sum hesi flakavirkir hava tilvirkað, sum metast skal um.

Kappingareftirlitið hevur ikki mett, at møguliga framleiðslan hjá hesum flakavirkjum er viðkomandi fyri nakran føroyskan marknað. Tær fiskavørur, sum hesi virkir tilvirka, hava beina kós til útlendskar marknaðir, og metir Kappingareftirlitið, at hetta virksemi er óviðkomandi fyri málið.

## 2. Avgerð

Grunda á tær upplýsingar, sum Kappingarráðið hevur kunnleika til, verður ikki mett, at yvirtøkan førir við sær, at virkna kappingin verður hindrað, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Kappingarráðið hevur tí avgjørt at góðkenna, uttan treytir, yvirtøkuna hjá P/f Faroe Link Maritime av ávísum ognum hjá Faroe Seafood í konkurs.

# 3. Inngangur

Kappingareftirlitið hevur móttikið fráboðan frá Bjørn á Heygum, adv., sum umboðar felagið P/F Faroe Link Maritime, við ávikavist P/f Varðin, P/f Bacalao, Sp/f Framherja og Samherja hf. sum innskjótarum. Fráboðað verður, at sáttmáli er gjørdur millum P/F Faroe Link Maritime og P/f Faroe Seafood undir konkurs um yvirtøku av niðanfyri tilskilaðu virkjum og skipum:

1. Fiskavirkinum Lynfrost í Runavík
2. Fiskavirkinum Nykur á Toftum
3. Fiskavirkinum í Vestmanna
4. Fiskavirkinum í Vági
5. M/S Stelkur
6. M/S Bakur
7. M/S Heykur
8. M/S Falkur
9. M/S Rókur
10. M/S Lerkur

Talan er um skip, sum koma undir bólkin ***partrolarar*** í § 7 a, nr. 2 í lógini um vinnuligan fiskiskap[1]. Skipini eiga 991,38 fiskidagar av samanlagt 4.220,07 døgum. Hetta svarar til 23.49 % av samlaðu fiskidøgunum hjá partrolarum.

Skylda er at fráboða hesa yvirtøku, tí minst tvær av fyritøkunum hava hvør ein umsetning, sum liggur omanfyri 4 mió. kr., sbrt. § 14, stk. 2, 3 pkt. í kappingarlógini. Fráboðanin skal leggjast fyri Kappingarráðið, tí samlaði umsetningurin hjá samtøkunum hjá luttakandi feløgunum er omanfyri 75. mió. kr., § 14, stk. 2, 3 pkt. í kappingarlógini.

# 4. Fyritøkurnar

Fyritøkurnar, ið umvegis P/F Faroe Link Maritime, yvirtaka áðurnevndu ognir, eru P/f Varðin, P/f Bacalao, Sp/f Framherji og Samherji hf. P/f Varðin fer at eiga 45% av nýggja felagnum, Sp/f Framherji og Samherji hf. kom at eiga 25% hvør, meðan P/f Bacalao fer at eiga 5%. Ávíst vinnuligt samband hevur verið millum Sp/f Framherja og Samherja hf. við tað, at síðstnevndi eigur í Sp/f FramInvest, ið eigur Sp/f Framherja.

P/F Varðin er móðirfelag hjá feløgunum, sum reka fýra uppsjóvarskip. P/f Driftin, ið eigur M/s Jupiter, P/f Krossbrekka, eigur M/s Finnur Fríða, P/f Hvamm, ið eigur M/s Trónda í Gøtu, og Sp/f Gulenni, ið eigur M/s Saksaberg.

M/s Jupiter, M/s Finnur Fríði og M/s Tróndur í Gøtu eru nóta- og trolskip, ið hoyra til skipabólkin nótaskip. Skipini fiska makrel, sild, svartkjaft og lodnu. M/s Saksaberg hoyrir til skipabólkin ídnaðarskip og fiskar ídnaðarfisk, umframt sild og makrel.

P/f Varðin eigur 60% av partapeninginum í Sp/f Skygni, ið eigur ein virkisbygning, sum verður útleigaður. P/f Varðin eigur eisini í P/f Kelduni saman við 05.08.07 Sp/f, Bergfrost P/f, FramInvest Sp/f, Havsbrún P/f, Krúnborg P/f og Palli hjá Mariannu P/f. P/f Keldan er ein av fimm eigarum í P/f Effo.

[1] løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við l.l. nr. 87. frá 18. August 2010.

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY




**Talva 1: Veiðurættindi í 2010**

| *P/f Varðin*<br>*Kvotur í bólkinum nótaskipum* | *Norðhavssild*<br>*Tons* | *Makrelur**<br>*Tons* | *Svartkjaftur*<br>*Tons* | *Lodna*<br>*Tons* |
|---|---|---|---|---|
| *FINNUR FRÍÐI* | 14.793 | 3.711 | 4.066 | 1.875 |
| *JUPITER* | 7.397 | 2.319 | 4.722 | 938 |
| *TRÓNDUR Í GØTU* | 7.397 | 3.711 | 5.448 | 938 |
| *Saksaberg* | 2.959 | 250 | 235 | 0 |
| Tilsamans | 32.545 | 9.991 | 14.471 | 3.751 |
| Lutfalsligur partur av heildarkvotuni hjá nótaskipum | 47,8% | 57,3% | 38,4% | 50,0% |

| *P/f Varðin*<br>*Kvota í bólkinum íðnaðarskip* | *Norðhavssild*<br>*Tons* | *Makrelur*<br>*Tons* | *Svartkjaftur*<br>*Tons* | *Lodna*<br>*Tons* |
|---|---|---|---|---|
| *Saksaberg* | 1196 | 0 | 0 | 0 |
| Tilsamans | 1196 | 0 | 0 | 0 |
| Lutfalsligur partur av kvotuni hjá ídnaðarskipum | 24,5% | 0,0% | 0,0% | 0,0% |

** Kvoturnar fyri makrel eru fyri 2009*

Kappingareftirlitið hevur eftir ráðnum frá Fiskimálaráðnum valt at nýta kvoturnar fyri makrel í 2009 sum grundarlag. Hetta er gjørt tí mett verður at 2010 er eitt sermerkt ár, tí sambært Fiskimálaráðnum verður makrelbýtið fyri 2010 ikki avgerandi fyri býtið í 2011.

Sp/f Framherji er móðurfelag hjá tveimum feløgum, sum eiga fiskiskipini P/f Vesturvón og P/f Regn, og sum harumframt eigur nóta- og trolskipið M/s Fagraberg. M/s Fagraberg hoyrir til skipabólkin nótaskip og fiskar sild, makrel, svartkjaft og lodnu.

Dóttirfelagið P/f Vesturvón eigur flakatrolaran M/s Vesturvón, ið hoyrir til skipabólkin flakatrolarar. M/s Vesturvón fiskar tosk og annan fisk uppi í Barentshavinum.

Hitt dóttirfelagið, P/f Regn, eigur línuskipið M/s Stapan, ið hoyrir til skipabólkin línuskip. M/s Stapin fiskar tosk, brosmu, hýsu o.a. hvítfisk undir Føroyum og Íslandi.




Eigararnir av Sp/f Framherja eru Sp/f FramInvest, ið eigur ein 1/3, og Anfinn Olsen og Elisabeth Eldevig, ið saman eiga 2/3. Eigaraviðurskiftini í Sp/f FramInvest eru soleiðis, at Samherji hf. eigur 73% av partapeninginum, meðan Anfinnur Olsen eigur [...].

| *P/f Framherji*<br>*Kvotur í bólkinum nótaskipum í 2010* | *Norðhavssild*<br>*Tons* | *Makrelur***<br>*Tons* | *Svartkjaftur*<br>*Tons* | *Lodna*<br>*Tons* |
|---|---|---|---|---|
| *Fagraberg* | 14.791 | 3.711 | 9.395 | 1.875 |
| *Høgaberg** | 2 | 0 | 1 | 0 |
| **Tilsamans** | **14.793** | **3.711** | **9.396** | **1.875** |
| **Lutfalsligur partur av kvotuni hjá nótaskipum** | **21,7%** | **5,5%** | **13,8%** | **2,8%** |

| *P/f Framherji*<br>*Kvotur í bólkinum flakatrolarar í 2010* | *Russiskur sjógvur*<br>*Tons* | *Norskur sjógvur*<br>*Tons* | *Svaldbard*<br>*Tons* | *Irmingarhavi*<br>*Tons* |
|---|---|---|---|---|
| Vesturvón | 4.365 | 2.256 | 447 | 995 |
| *Toskur* | 3.236 | 1.335 | 359 | 0 |
| *Hýsa* | 499 | 470 | 0 | 0 |
| *Upsi* | 0 | 335 | 0 | 0 |
| *Flatsfiskur* | 630 | 0 | 0 | 0 |
| *Kongafiskur* | 0 | 0 | 0 | 995 |
| *Annað* | 0 | 116 | 88 | 0 |
| Tilsamans | 4.365 | 2.256 | 447 | 995 |
| Lutfalsligur partur av kvotuni hjá flakatrolarum | 35,1% | 31,1% | 29,2% | 33,3% |

| *P/f Framherji*<br>*Fiskidagar og kvota í bólkinum línuskip í 2009/10* | *Føroyum*<br>*dagar* | *Íslandi*<br>*tons* |
|---|---|---|
| Stapin | 130 | 343 |
| **Tilsamans** | **130** | **343** |
| **Lutfalsligur partur av døgum og kvotum hjá línuskipum** | **4,4%** | **6,1%** |

* ikki í flotanum longur
** tølini fyri makrel eru frá 2009

P/f Bacalao er felag, sum eigur minniluta part á 21% í P/f Nofa, ið eigur partrolararnar M/s Vesturskin og M/s Vesturvarða. Høvuðspartaeigari í P/f Nofa er Sp/f Vesturskin, ið eigur 51% av partabrøvunum.

| *P/f Nofa*<br>*Fiskidagar í bólkinum partrolarar í 2009/10* | *í Føroyum*<br>*dagar* |
|---|---|
| ***Vesturskin & Vesturvarði*** | 142 |
| **Tilsamans** | 142 |
| **Lutfalsligur partur av døgum hjá partrølarum** | 3,3% |

Skipini, sum keypt verða frá Faroe Seafood í konkurs, eru Stelkur, Bakur, Heykur, Falkur, Rókur og Lerkur. Talan er um partrolarar.

| *P/f Faroe Link Maritime*<br>*Fiskidagar í bólkinum partrolarar í 2009/10* | *í Føroyum*<br>*dagar* |
|---|---|
| ***Stelkur*** | 257 |
| ***Bakur*** | 225 |
| ***Heykur*** | 121 |
| ***Fálkor*** | 112 |
| ***Rókur*** | 149 |
| ***Lerkur*** | 127 |
| **Tilsamans** | 991 |
| **Lutfalsligur partur av** | 23,5% |

## 5. Regulering

### 5.1. Veiðurættindi

Høvuðslógin innan fiskivinnu er løgtingslóg nr. 28 frá 10. mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, við seinni broytingum[2]. Áðrenn 1994 var frítt at fiska hjá føroyskum fiskiførum í føroyskum sjóøki, men við lógini vóru kvotur ásettar. Hetta varð broytt í 1996, tí mett var, at ein skipan við fiskidøgum egnaði seg betur enn kvotur, til fiskiskap eftir botnfiski. Við eini skipan við fiskidøgum slapp man undan, at veiða varð tveitt útaftur. Í dag er fiskidagaskipanin galdandi fyri fiskiskap eftir botnfiski, meðan kvotuskipanin er galdandi fyri veiðu eftir uppsjóvarfiski í føroyskum sjóøkið. Á landsleiðum uttan fyri Føroyar, har Føroyar eiga veiðurættindi eru kvotuskipanir galdandi. Lógin um vinnuligan fiskiskap er galdandi fyri føroyska sjóøki og øll økir, har Føroyar eiga fiskivinnurættindi.

Endamálið við lógini um vinnuligan fiskiskap framgongur av §2:

> *§ 2. Livandi tilfeingið á føroysku landleiðunum og tey rættindi, føroyska heimastýrið við samráðingum hevur rokkið ella eftir altjóða rætti eigur uttan fyri føroysku landleiðirnar, eru ogn Føroya fólks. Dentur verður lagdur á, í umsitingini av hesi lóg, at varðveita tilfeingið og at troyta og gagnnýta hetta burðardygt á skilabesta hátt, lívfrøðiliga og búskaparliga, við virðing fyri sambandinum millum ymisku dýra- og plantustovnarnar í havinum og meingi teirra, til tess at tryggja besta samfelagsbúskaparliga íkastið frá fiskivinnuni, støðugar arbeiðs- og inntøkumøguleikar og møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið.*

[2] Løgtingslóg nr. 28 frá 10. Mars 1994 um vinnuligan fiskiskap, sum seinast broytt við Ll. Nr. 87 frá 18 august 2010

> *Endamálsorðingin leggur upp til eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu, men tað eru eisini onnur samfelagslig atlit. Sambært §2 skal tilfeingi umsitast soleiðis, at tað tryggjar ein støðugan arbeiðsmarknað og útjaðarmenning.*

Fyri at reka vinnuligan fiskiskap í føroyskum sjóøki ella at trýta tey veiðurættindi sum føroyska heimastýri eigur aðrastaðni, er fyrsta kravið, at fiskifarið hevur eitt veiðuloyvi frá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum, sbrt. §5, stk. 3[3]. Við loyvinum hevur fiskifarið fingið góðkenning til at reka vinnuligan fiskiskap, men gevur ikki rættindi til at veiða av fiskastovni.

Fiskiloyvir eru ein rættur, sum verður latin eigara av fiskifari, ið hevur fingið áðurnevnda veiðiloyvi, at veiða ávíst fiskidagatal og/ella ávísa nøgd av ávísum fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári, sbrt. §5, stk. 4.

Einstøku fiskiførini verða flokkaði í ein av seks bólkum. Hesir eru sambært §28, stk. 1:

- Bólkur 1: Trolarar yvir 400 HK, lemmartrolarar
- Bólkur 2: Trolarar yvir 400 HK, pør
- Bólkur 3: Línuskip yvir 110 tons
- Bólkur 4: Útróðrarbátar yvir 15 tons
- Bólkur 5: Útróðrarbátar undir 15 tons á húkaveiði
- Bólkur 6: Onnur veiða

Fyri botnfisk er fiskidagaskipan galdandi í føroyskum sjóøki, har einstøku bólkarnir av fiskiførum fáa tillutað eitt samla fiskidagatal, ístaðin fyri eina felagskvotu, sbrt. §29, stk. 1.

Fiskidagatal verður ásett við lóg á hvørjum ári, sbrt. §22 í lógini um vinnuligan fiskiskap. Í hesum sambandi letur Havstovan landsstýrismanninum stovnsmetingar, tilmæli um fiskidagar komandi fiskiárið, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið. Fiskidaganevndin letur somuleiðis eitt tilmæli um fiskidagar fyri komandi fiskiárið, og hvussu fiskiskapurin skal skipast tað komandi fiskiárið. Broytingar í fiskidagatalinum skulu m.a. vera grundaðar á metingar um, hvat fiskidagatal fyri hvønn høvuðsbólk av fiskiførum best tryggjar, at fiskastovnarnir verða gagnnýttir burðardygt.

Fiskiskapur eftir uppsjóvarfiski í føroyskum øki, og økjum har Føroyar eiga veiðurættindi, verður reguleráð við kvotum. Her verða ásettar felagskvotur fyri einstøku skipabólkarnar, sum síðan kann verða býtt út á hvørt fiskifarið sum eginkvota ella felagskvota við hámarkið.

### 5.2. Ognarskapur í fiskivinnuni
Ásetingar eru, sum avmarka útlendskan ognarskap í føroysku fiskivinnuni. Tað er forboð ímóti, at fysiskir persónar búsitandi uttan fyri Føroyar eiga fiskifør við veiðuloyvi. §7, stk. 2 ásetur nevniliga, at likamligir persónar, sum eiga eitt fiskifar og ynskja at fáa eitt veiðiloyvi, skulu hava verið skrásettir í føroyska fólkayvirlitinum seinastu tvey árini og skulu vera fult skattskyldugir í Føroyum.

Sambært §7, stk. 3 skulu løgfrøðiligir persónar, sum eiga fiskifør og ynskja at fáa eitt veiðiloyvi, lúka 3 treytir:

1. Felagið skal vera partafelag, smáparta-felag, lutafelag ella partsreiðarí og skal hava fast tilknýti til Føroyar. Er talan um partafelag ella smápartafelag, skulu partabrøvini vera navnapartabrøv.

[3] Útróðrarbátar undir 15 tons nýtast ikki veiðuloyvi

2. Eigararnir av í minsta lagi 2/3 av eginpeninginum, herundir parta-peninginum, umframt ábyrgdar-peninginum, sum somuleiðis eiga í minsta lagi 2/3 av atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, skulu lúka treytirnar í stk. 2. Føroyska nevndarumboðanin skal í minsta lagi vera 2/3 av nevndini og lúka treytirnar í stk. 2. Skal felagið luta út vinningsbýti, skal føroyski parturin í minsta lagi fáa útlutað 2/3.
3. Eiga útlendingar í fiskifari, heima-hoyrandi í Føroyum, skal hetta góðkennast av landsstýrismanninum. Fara broytingar fram í ognar-viðurskiftunum, herundir parta-peninginum umframt ábyrgdarpeninginum, atkvøðurættinum og avgerðarrættinum í felagnum, skal hetta fráboðast landsstýrismanninum, áðrenn broytingarnar fara fram, og landsstýrismaðurin skal góðkenna slíkar broytingar. Broytast ognarviðurskiftini soleiðis, at lutfallið 1/3 og 2/3 broytist, og útlendski parturin harvið gerst størri enn 1/3, fellur veiðiloyvið burtur.

Endamálið við ásetingunum í §7, stk. 2 & 3 er at tryggja, at føroysk veiðurættindi ikki koma á útlendskar hendur. Hetta er eitt nationalt atlit – men í kappingarligum høpi er talan um avmarking av atgongd til eina vinnu.

Ásetingar eru eisini í lógini um vinnuliga fiskiskap, sum hava til endamáls at virka ímóti, at øll veiðurættindi enda á fáum hondum. §7a ásetur, at likamligur ella løgfrøðiligur persónur, sum rekur vinnuligan fiskiskap sambært hesi lóg, einsamallur ella saman við nærstandandi, beinleiðis ella óbeinleiðis, einans kann eiga ein avmarkaðan part av veiðuloyvunum. Lógarásetta ognarlutfallið liggur millum 20-35% alt eftir hvør skipabólkur talan er um.

### 5.3. Umsetilig veiðuloyvi

Somuleiðis eru fleiri ásetingar, ið avmarka flyting av veiðuloyvum millum fiskifør. Sambært §8 kann veiðuloyvi einans flytast til annað fiskifar, um hetta hevur somu ella minni fiskiorku. Veiðuloyvi kunnu flytast til fiskifør, sum longu hava veiðiloyvi, men tó einans innanfyri somu skipabólkar. Alt, sum hevur við flyting av veiðiloyvi at gera, fer fram við umsókn til landstýrismannin í fiskivinnumálum, sum skal góðkenna allar flytingar. Landstýrismaðurin hevur heimildir til at gera undantøk frá reglunum.

Fiskiloyvi kunnu undir ávísum treytum flytast millum skip við veiðuloyvi. Hesi kunnu í ávísan mun flytast millum skipabólkar – men forðingar eru. T.d. er tað ein meginregla, at fiskiloyvi ikki kunnu flytast millum skipabólk 1 og 5, sbrt. §3, stk. 2 í kunngerð nr. 3 frá 12. januar 2011 um avhending av fiskidøgum. Somuleiðis er ikki loyvt at flyta fiskiloyvi millum húk og trol í skipabólki 4, sbrt. §3, stk. 3, óansæð um hetta fer fram umvegis aðrar skipabólkar, sbrt. §3, stk. 4. Heimild er latin landstýrsimanninum at nágreina í kunngerð, hvussu flyting av fiskiloyvum kann fara fram, og í dag er eitt stórt tal av kunngerðum, sum nágreina hetta.

Út frá einum kappingarligum sjónarmiði kann staðfestast, at mobiliteturin á marknaðinum fyri veiðuloyvi og fiskiloyvi er avmarkaður av galdandi lóggávu, men er til staðar í ávísan mun.

Tá tað kemur til avreiðing, eru reglurnar soleiðis, at øll botnfiskaveiða, sum er veidd í føroyskum og/ella íslendskum øki, skal avreiðast um eina góðkenda innvigingarskipan í Føroyum, sbrt. §2 í kunngerð nr. 95 frá 27. juni 2005 um treytir fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands, sum seinni broytt við kunngerð nr. 114 frá 13. desember 2010.

Sambært §2, stk. 2 skal fyrsta søla av veiðini altíð fara fram í Føroyum. Undantak er tó frá meginregluni, tí sambært §4, stk. 1 er loyvt at avreiða 25% av veiðuni uttanlands. Hetta merkir at 75% av fyrstu søluni fer fram í Føroyum.

Um veiðan verður flutt óvirkað av landinum, skal útflytarin skjalprógva yvirfyri TAKS, at hann seinastu 7 dagarnar hevur keypt veiðuna á eini góðkendari uppboðssølu, sbrt. § 3. Einans fiskifar við fiskiloyvi sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, kann bjóða fisk til sølu um eina góðkenda uppboðssølu, sbrt. §2, stk. 3.

Hetta merkir at veiðan skal antin tilvirkast her á landi ella skal 75% av veiðuni seljast á eini góðkendari uppboðssølu.

Ásetingarnar um innvigingarskipan og útflutning av óvirkaðari veiðu eru ikki galdandi fyri uppsjóvarfisk.

## 6. Marknaður

P/F Faroe Link Maritime fer at virka á tveimum rávøru marknaðum og einum marknaði fyri tilvirkaðar fiskivørur.

Rávørumarknaðirnir eru søla av fiskiveiðu á góðkendari føroyskari uppboðssølu og søla av fiskiveiðu í góðkendari útlendskari havn. Skilmarkingin í tveir ymiskar rávørumarknaðir kemur av, at lóggávan ásetur, at 75% av fiskiveiðuni, sum verður útflutt ótilvirkað, skal umvegis eina góðkenda føroyska uppboðssølu, og at 25% av veiðuni, sum verður útflutt, kann avreiðast í eini góðkendari útlendskari havn. Fiskiveiða, sum verður latin egnum flakavirkjum, er ikki partur av einum rávørumarknaði. Talan er um innanhýsis sølu.

Landafrøðiliga skilmarkingin av marknaðinum fyri tey 75% er Føroyar, meðan skilmarking av marknaðinum fyri tey 25% er mest sannlíkt Danmark, Norra og Ísland og Bretland.

Triði marknaðurin - marknaðurin fyri tilvirkaðar fiskavørur er útlendskur marknaður, við tað at føroysk fiskaframleiðsla verður burturav seld til útlendskar keyparar. Ein skilmarking av hvørjar viðkomandi vørur eru á marknaðinum er ikki avmarkað til einans føroyskar fiskavørur. Talan er um ein globalan marknað bæði hvat eftirspurningi og útboði viðvíkur.

Talan er í stóran mun um marknaðir, sum eru fevndir av umfatandi regulering, har bæði mest loyvda miðsavningsprosent, atgongd til marknað og sølan á marknaðinum eru regulerað við lóg.

## 7. Meting

### 7.1. Skilmarking av viðkomandi marknað sambært kappingarlógini

Sambært §5, stk. 1 í kappingarlógini skal skilmarkingin av viðkomandi marknaði fara fram við varaseting av eftirspurningi og útboði. Ásetingin hevur tó ikki við sær, at tað ikki ber til at brúka onnur metingarstøði, enn tey nevndu. Endamálið við at skilmarka marknaðir er at gera greitt, hvørjar kappingaravmarkingar eru, ella eitt nú um viðskiftafólkini hava aðrar møguleikar fyri veitingum av vørum og tænastum eisini landafrøðiliga[4].

Ein ávísur vørumarknaður skal skiljast sum allar tær vørur, sum brúkarin metir kunnu varasetast fyri hvørja aðra, orsakað av eginleikunum hjá vørunum, prísi ella nýtslu.

[4] Sambært lógarviðmerkingum til §5

Landafrøðiliga skilmarkingin skal avmarka tað økið, har luttakandi fyritøkurnar selja og keypa vørur og tænastur, sum hava so mikið eins kappingarumstøður, og sum kunnu skiljast frá grannaøkjum, av tí at kappingarumstøðurnar har eru munandi øðrvísi.

Tá varaseting av eftirspurningi verður kannað, verður hugt at, hvørjar vørur brúkarin metir kunnu varasetast fyri ávísu vøruna, sum luttakandi fyritøkur selja ella keypa. Sostatt verður kannað, hvussu brúkarin ber seg at, um lutfalsligi prísurin økist á ávísu vøruni. Hvørjar vørur vil brúkarin skifta yvir til. Tær vørur, sum brúkarin vil skifta til, eru at finna á sama marknaði sum ávísa vøran.

Tá varaseting av útboði verður kannað, verður mett um hvørjir aðrir veitarar kunnu, sum svar uppá smáar varandi prísbroytingar á ávísu vøruni, innan stutt tíðarbil, vanliga í mesta lagi 1 ár[5], umstilla framleiðslu og sølu uttan týðandi meirkostnað og váða, til vørur sum kunnu varasetast fyri ávísu vøruna.

Um tað eftir varaseting av eftirspurningi og útboði er ivamál um kappingarligu støðuna á marknaðinum, skal møgulig kapping kannast. Her verður kannað í hvønn mun fyritøkur yvir eitt longri tíðarbil hava møguleika at fáa atgongd til marknaðin, har ávísa vøran er at finna.

Tað serliga í hesum málið er, at lógin um vinnuligan fiskiskap ásetur, hvør kann selja veiðu, og hvar hon kann seljast. Hetta hevur stóran ávirkan á skilmarkingina av viðkomandi marknaði.

Viðvíkjandi varaseting av eftirspurninginum hevur lóggávan ikki stórvegis av ávirkan, men tað er greitt, at 75/25% marki fyri avreiðingum ger, at um prísurin er kappingarførur, so vilja føroysk fiskisfør í minni mun avreiða í útlendskum havnum. Her fer sostatt ein ávís varaseting fram av eftirspurninginum. Hetta er ikki galdandi um prísurin ikki er kappingarførur, tí brúkarar í útlendskari havn fáa ikki fatur á meir enn 25% av tí veiðu, sum føroysk fiskiskip veiða og selja ótilvirkað.

Viðvíkjandi varaseting av útboði hevur lóggávan heldur størri ávirkan á, hvussu skilmarkingin av viðkomandi marknað kann fara fram. Lógin um vinnuligan fiskiskap setur skott millum hvønn skipabólk, og hetta merkir, at flytiføri[6] millum skipabólkar er lítið og einki. Ein ávísur mobilitetur er loyvdur eftir umsókn og góðkenning frá landsstýrismanninum, men stórar avmarkingar eru í mobilitetinum. T.d. kann fiskiloyvi ikki flytast millum húk og trol. Hetta merkir, at um prísurin á einum fiskaslagi økist er tað ikki sannlíkt, at fiskifør í øðrum skipabólkum, innan stutt tíðarbil, kunnu umstilla sín fiskiskap til hetta fiskaslagi. Kvotur og fiskidagar eru í ávísan mun umsetilig rættindi, men sum meginregla einans innanfyri egnan skipabólk. Tískil kann ikki væntast nøkur serlig útboðsvaraseting á rávøru marknaðinum.

**7.2. Marknaðarráðandi støða**

Orsaka av at skott eru millum einstøku skipabólkarnir, og at ásetingar eru um mest loyvdu miðsavning, sum liggur millum 20-35% alt eftir hvør skipabólkur talan er um, metir Kappingareftirlitið ikki, at tað er nøkur orsøk at halda, at P/F Faroe Link Maritime og eigarar tess fáa ov stórt marknaðarvald við yvirtøkuni av ognunum hjá Faroe Seafood. Vanliga verða miðsavningar millum 20-35% ikki mettar at geva orsøk til at halda, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist. Kappingareftirlitið er ikki komið fram á viðurskifti, sum saman við fyrrnevndu miðsavning kunnu føra til, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

[5] Levinsen(2009;216)
[6] mobilitetur

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Talan er um eina ráðandi støðu, tá ein fyritøka hevur eina so ráðandi búskaparliga støðu, at fyritøkan hevur møguleika at forða fyri munagóðari kapping á umrødda marknaðinum, av tí at nevnda støða gevur fyritøkuni møguleika fyri óheftum atburði mótvegis kappingarneytum, viðskiftafólki og í síðstu atløgu brúkarunum[7].

Kappingareftirlitið metir ikki, at yvirtøkan av ognunum hjá Faroe Seafood førir við sær, at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist. Lóggávan á økinum avmarkar, hvussu nógv veiðuloyvi kunnu ognast – mest loyvdi ognarpartur liggur niðanfyri tað, sum í kappingarligum høpi vanliga verður mett at geva høvi til at halda, at ein marknaðarráðandi støðu verður skapt ella styrkist.

Sjálv sølan er eisini regulerað soleiðis, at 75% av allari sølu av veiðu skal umvegis eina føroyska uppboðssølu, meðan 25% kann avreiðast í eini góðkendari útlendskari havn. Kappingareftirlitið metir ikki, at ein seljari á eini uppboðssølu kann hava óheftan atburð mótvegis kappingarneytum ella keyparum. Á einastu uppboðssølu í Føroyum, Fiskamarknaði Føroya, á Toftum, eru treytirnar soleiðis, at allar vanligar handilstreytir uttan prísurin eru staðfestar av uppboðssøluni, so sum góðska og gjalding. Prísurin verður avtalaður millum keyparar og seljara. Kappingareftirlitið metir, at uppboðssøluformurin í sær sjálvum er ein handilsmarknaður, sum virkar á ein fulldyggan hátt.

Umstøðurnar á seljara og keyparasíðuni kunnu tó gera, at fyrimunurin við eini uppboðssølu minkar – t.d. um talið av seljarum ella keyparum er lítið, ber til í ávísan mun at nýta marknaðarvald. Her er tó vert at leggja til merkis ásetingarnar um, at 75% av veiðuni, sum ikki verður tilvirkað, skal seljast í Føroyum – hetta avmarkar møguleikan hjá seljarum at ávirka prísin á uppboðssøluna á ein óveruligan hátt.

Um veiðan hjá teimum trimum keyptu partrolarunum fer burturav til tey keyptu flakavirkini, er óneyðugt at meta um kappingarligu ávirkanina, tí tá er talan um innanhýsis sølu. Tá er tað sølan av teimum fiskavørum, sum hesi flakavirkir hava tilvirkað, sum metast skal um.

Kappingareftirlitið hevur ikki mett, at møguliga framleiðslan hjá hesum flakavirkjum er viðkomandi fyri nakran føroyskan marknað. Tær fiskavørur, sum hesi virkir tilvirka, hava beina kós til útlendskar marknaðir, og metir Kappingareftirlitið, at hetta virksemi er óviðkomandi fyri málið.

**8. Niðurstøða**

Grunda á tær upplýsingar, sum Kappingarráðið hevur kunnleika til, verður ikki mett, at yvirtøkan førir við sær, at virkna kappingin verður hindrað, við tað at ein marknaðarráðandi støða verður skapt ella styrkist.

Kappingarráðið hevur tí avgjørt at góðkenna, uttan treytir, yvirtøkuna hjá P/f Faroe Link Maritime

Vegna Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
Forkvinna

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

[7] lógarviðmerkingar til §11, stk. 2